Dreymurin er at liva av t nleiki

"Mær dámar ótrúliga væl Jeff Porcaro, trummusláaran úr ToTo. Jeff doy›i í 1992, men hann var og er kongurin av øllum. Ein rættur tónleikagudur"

Í eini kjallaríbú› á Landavegnum í Havn b‡r 22 ára gamli trummusláarin, Janus Nicolajsen.
Í farnu viku fekk Yngd eitt prát vi› Janus, sum ikki dylir, at hann ætlar sær at liva av at vera tónleikari

JÁKUP BOGI JOENSEN

Havi mangan gingi› framvi› á Landavegnum í Havn og undrast yvir, hva›ani tann øgiliga mongdin av larmi kemur frá. Men nú er gátan loyst.

Tí í eini kjallaríbú› á Landavegnum b‡r 22 ára gamli trummusláarin, Janus Nicolajsen. Og ta› er hann sum um kvøldarnar plagar at sita aftan fyri trummurnar og hugna sær. At hann hevur evnir til tónleikin, hevur hann fyri langari tí› sí›ani prógva. Tí umframt at hava veri› ni›ri í Danmark á skúla, har hann fyri ta› mesta fekst vi› at gera og spæla tónleik, so hava bo› fleiri fer›ir veri› eftir honum úr føroyskum tónleikabólkum.

Millum hesar kunnu vit nevna, Eclipse og Saxony. Eisini royndi hann seg ein yvirgang í bólkinum Who Cares, og har kom væl burturúr, tí saman vóru teir í studio og tóku upp eitt lag, sum stutt og greitt kallast fyri D og sum í dag er at finna á útgávuni Rock í Føryum 2.

Sí›ani Janus Nicolajsen fyri stuttari tí› sí›ani kom aftur til Føroya hevur hann fyri ta› mesta bara vant fyri seg sjálvan. Men hann situr so avgjørt ikki bara hendur í favn. Nei, nei. Hann er longu byrja›ur at leita sær eftir fólki at spæla saman vi›. Og hann ger nógv burturúr. So nógv, at hann hevur gjørt sær tann ómak, at heingja plakatir runt um í b‡num, har hann sóknast eftir fólki. Hetta vísir bara, hvussu nógv hann leggur í tónleikin, og hann dylir heldur ikki fyri, at tónleikur er ein stórur partur av tilveru síni. Hann elskar tónleikin.

Vil liva av tónleiki

Janus Nicolajsen hevur altí› havt stóran áhuga fyri tónleiki.

- Eg minnist frá heilt ungum, at eg plagdi at lurta eftir tónleiki saman vi› foreldrum mínum. Seinni fekk eg nøkur kassettubond, sum eg sjálvur slapp at eiga, og teimum lurta›i eg nógv eftir, minnist Janus.

Ta› gingu nøkur ár, og áhugin fyri tónleikinum bara vaks. Og tá Janus gjørdist tíggju ára gamal, fór hann at ganga til undirvísing á musikskúlanum í Havn. Hetta var naka› í dámdi Janusi væl, og hann fekk nógv burturúr.

- Í fyrstuni hev›i eg ein svenskan lærara, men seinni tá hesin fór av aftur landinum, fekk eg Jónleif Jensen til lærara.

At Janus hevur fingi› væl burtur úr, er onki at taka seg aftur í. Og hann mennist alla tí›ina sum trummusláari. Máli› hjá Janusi er greitt. Hann vil kunna liva væl av tónleiki. Men hann ásannar, at ta› er sera trupult at liva av at vera tónleikari í Føroyum.

- Vit eru eitt líti› land. Umstø›urnar eru ikki av teimum bestu hjá tónleikarum at liva undir. Millum anna› er ta› trupult hjá bólkum at fáa venjingarhølir, og stu›ul ver›ur ikki veittur til føroyskar tónleikaútgávur. Ta› er ikki ta› sama sum at vera eitt nú í Danmark, sta›festir Janus.

Hann hevur nevnliga fyri stuttar tí› sí›an veri› í Danmark á skúla, har hann fyri ta› mesta fekst vi› tónleik. Skúlin, Janus hevur vei› á eitur Fløng Produktiónshøjskole. Skúlin liggur í Fløng, sum er tætt vi› Roskilde. Á skúlanum royndi Janus eitt sindur av hvørjum, men tó heldur hann, at sokalla›i "Party Bands" var stuttligastur at spæla saman vi›.

- Vit høvdu ein frálíkan bólk. Vit plagdu ofta at spæla til dans og konsertir, men vóru tó nakrar fer›ir í studio og spældu inn nøkur løg. Men hvat slag av tónleiki spældu tit?

- Vit spældu allan møguliga tónleik. Tó mest rockkendan tónleik sum okkum dámdu væl.
Janus Nicolajsen dámar annars allan møgulia tónleik, og kann av røttum kallast at vera ein all-round tónleikari.

Á trummunum er hann í øllum førum sera dugnaligur, og kann um hann leggur í , vinna seg langt fram á tónleikapallin.

Inspirera›ur av tónleiki

Vit spurdu Janus Nicolajsen um, hvar hann fær inspiratión frá.

- Eg kann blíva inspirera›ur av so nógvum. Bara at sita ni›ri í b‡num ella ganga ein langan túr í haganum, ta› kann inspirera meg rættiliga nógv. Men mestu inspiratinirnar koma tó gjøgnum sjálvan tónleikin. Eg lurti ógvuliga nógv eftir tónleiki, og ta› sigur seg sjálvt, at okkurt setur seg fast eitt ella anna› sta› uppi í heilanum.

Tá vit at enda spyrja Janus, um hann hevur idolir ella kanska ein yndistónleikara er hann skjótur at svara.

- Mær dámar ótrúliga væl Jeff Porcaro, trummusláaran úr Toto. Jeff doy›i í 1992, men hann var og er kongurin av øllum. Ein rættur "tónleikagudur".

Annars dámar mær væl Toto, men eisini lurti eg nógv eftir Sting. Av føroysku tilfari dámar Janusi best útgávurnar hjá Moirae.

Janus leggur annars sera stóran dent á, at han er ein all-round tónleikari, men Toto og kanska serliga Jeff Porcaro, fara altí› at standa sum ein var›i í tónleikasøguni.

Í hvussu so er hjá Janusi Nicolajsen, sum kann, um hann hevur vilja og áræ›i koma sera langt innan tónleikaheimin.